# Tíðarrit við dygdarskaldskapi

Leygarkvøldið býður nýggja tíðrarritið *Vencil* til móttøku á Tjóðpalli Føroya við upplestri og tónleikaframførslu. Móttøkan er almenn.




TÍÐARRIT
*Rigmor Dam*

Sambært teimum báðum ritstjórunum, Oddfríði Marna Rasmussen og Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, er endamálið við tíðarritinum *Vencili* at birta upp undir hugan og førleikan hjá fólki at lesa skaldskap á føroyskum, og samstundis at eggja rithøvundum og týðarum til at skriva meira og betur.

– Hetta verður gjørt við at bjóða dygdargóðan skaldskap innan allar skaldskapargreinir, siga teir báðir og nevna, at í fyrstu útgávuni eru stuttsøgur eftir Franz Kafka, Charles Bukowski, Sámal Kristian Jacobsen, Raymond Carver og onnur. Eisini eru yrkingar eftir Allen Ginsberg, Bárð Persson, Carl Sandburg, Rannvá Skeel Johannesen, Edith Södergran og nógv onnur.

### Hvør er Vencil?

– Jú, Vencil er eitt nýtt tíðarrit við 118 blaðsíðum á tremur við skaldskapi á føroyskum máli. Har ber til at lesa yrkingar, skrivaðar til Vencil, og týddar yrkingar, sum í Vencili á fyrsta sinni standa á prenti á føroyskum. Eisini er ein long yrking, sum var við til at broyta eitt heilt samfelag og 16 yrkingar eftir ein einstakan høvund, sum stendur sum eitt lítið savn inni í Vencili, siga ritstjórarnir báðir.

– Og so eru stuttsøgur bæði úr heimligum jørðildi og stuttsøgur úr heimsbókmentunum, leggja teir afturat og vísa á, at nógvir av høvundunum í Vencili fyri fyrstu ferð kunnu verða lisnir á føroyskum.

### "Ýl"

Mangt forkunnugt verður á skránni leygarkvøldið. Eitt nú boða teir báðir fyrireikararnir frá, at Hans Tórgarð fer at lesa fyrsta partin av longu yrkingini "Ýl" (Howl) eftir Allen Ginsberg, sum Gunnar Hoydal hevur týtt til føroyskt. Og teir greiða frá, at í ár eru 50 ár liðin síðani "Ýl" stóð prentað í yrkingasavninnum *Howl and Other Poems*. Í forørðinum í hesum savni, sigur William Carlos Williams: *Hann hevur bókstaviliga verið gjøgnum helvitið, og á vegnum møtti hann einum manni, nevndur Carl Solomon. Teir býttu um tenn og skarn úr hesum lívi, ið ikki kann verða lýst uttan at brúka tey orð, ið brúkt vórðu at lýsa lívið.*

Carl Solomon var vinmaður Allen Ginsberg. Teir vóru innlagdir samstundis á sinnisjúkrahúsinum í Rocklandi.

*Ýl er ógvuliga jødisk í sínum kenslum. Málllærulagið er bíbilskt í sínum endurtøkum. Ýl er eitt ógvusligt ýl eftir allari afturhaldandi siðmenning, ið ikki dugir at hugsa, ið sum drepur andan, ið sigur, at tess harðari tú rópar, tess minni verður tú hoyrdur*, segði Richard Eberhart, tá ið hann ummælti *Howl and Other Poems* í New York Times Book Rewiew 2. september í 1956.

"Ýl" varð á fyrsta sinni lisin upp í Six Gallery í desembermánaði í 1955. Upplesturin skapti slíka øsing, at Allen Ginsberg varð settur í fongsul. Tríggjar mánaðir seinni vann hann rættarmálið og varð latin leysur.

### Aðrir mætir rithøvundar

Við í Vencili eru eisini 16 yrkingar eftir finnlandsvenska yrkjaran Edith Södergran. Hon livdi eitt sera trupult lív, sum var merkt av tuberklum, sum hon bara 31 ára gomul doyði av. Við sínum livandi myndamáli gevur hon øllum tí vakra ein heilt nýggjan og serstakan dám. Tær 16 yrkingarnar, sum standa í Vencili, skulu verða lisnar sum eitt lítið úrval úr hennara fyrsta yrkingasavni *Dikte* frá 1916. Ebba Hentze hevur týtt.

Eisini eru so mætir menn sum teir báðir amerikansku rithøvundarnir, Raymond Carver og Charles Bukowski, við í Vencili. Teir hava báðir sín heilt egna stíl, ið mangir rithøvundar um allan heimin hava fingið íblástur frá. Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð hevur týtt Raymond Carver, og Petur Pólsson Jensen hevur týtt stuttsøguna eftir Charles Bukowski.

### Føroyskir høvundar

Sambært Arnbirni og Oddfríði eru tað sjálvandi ikki bara útlendskir høvundar við í Vencili. Eisini eru nakrir av bestu rithøvundunum í Føroyum við. Millum teirra kunnu nevnast

